

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Neistin koppaði oddaliðnum

**HONDBÓLTUR** Stjørnan tapti fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum, tá greipuvinnararnir vitjaðu í høvuðsstaðnum í gjár

Uni Holm Johannesen

Neistin hevur ikki verið so væl fyri seinastu árini, sum júst nú.

Blálittu høvuðsstaðarkvinnurnar vunnu í gjár móti Stjørnuni, sum hevði fult stigatal undan dystinum.

Neistin er nummar tvey í løtuni, eitt stig aftan fyri Stjørnuna.

Høvuðsorsøkin er góðu gongdina er Barbara Brauer. Hon skifti til Neistan undan kappingarbyrjan, og hon hevur gingið fremst, síðan liðini løgdu frá landi.

Hon skeyt 12 mál í gjár.

Brauer var serliga eyðsýnd í seinna hálvleiki. Neistin hevur ikki vunnið fleiri av slíkum oddadystum seinastu árini, men Tjaldrið og Stjørnan hava tapt í høllini á Hálsi í hesum kappingarárinum.

Tá tú eina ferð venur teg við at vinna toppdystir, so ert tú komin langt.

## Neistin var frammanfyri

Neistin var við yvirlutan so at siga allatíðina.

Munurin var tvey til trý mál í stórum løtum av dystinum, og hóast Stjørnan rann aftaná, so skrædnaði ongantíð av álvara millum liðini.

Dysturin var serliga merktur av stríðsvilja og avgjørdum verjuspæli.

Stjørnan javnaði til 25-25, tá 21 minuttir vóru spældir av seinna hálvleiki.

So fór Neistin avstað aftur, og gestirnir úr Klaksvík megnaðu ikki at vinna leiðsluna aftur.

**Neistin – Stjørnan** 30-28 (13-12)

Dómarar: Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen

**10 min.: 7-3**
**20 min.: 9-9**
**40 min.: 19-15**
**50 min.: 25-23**

**Neistin:** Barbara Brauer 12, Bára Hansen 5, Marjun Danberg 5, Jacklin Durhuus 4, Rakul Magnussen 3, Birita Wardum 1.
**Stjørnan:** Durita Christophersen 7, Durita Ljósstein 6 (3), Valentina Suciu 6, Una Olsen 4, Nicolette R. Hansen 3, Edith Hansen 1, Ella Petersen 1.

# Trý innlegg góvu trý mál



LANDSLIÐIÐ

*Tó nakrir glottar vóru, runnu føroysku leikararnir mest aftaná skotum*

*Mynd: Polfoto*

**FÓTBÓLTUR** Jann Ingi Petersen sendi bóltin avstað við fullari ferð eftir lítlari løtu. Bólturin brast í tvørtræið. Annars setti føroyska landsliðið ongantíð skotska málverjan undir trýst, tá Skotland vann 3-0 á Føroyum. Trý innlegg vóru orsøkin til trý mál

Uni Holm Johannesen

Føroyska landsliðið, og føroyingar sum heild, tosa altíð um, at landsliðið fær óheppin mál ímóti sær, og at verjuparturin skuldi verið meira ansin.

Øll mál í fótbólti verða helst skotin, tí verjuparturin ger mistøk.

Men í gjár skuldi føroyski verjuparturin av álvara at ansa betri eftir.

Øll málini, sum skotar fingu, var eftir innlegg úr føroysku vinstru síðu. Í brotsteiginum vóru føroyingarnir lítið avgjørdir og góvu mótstøðumonnunum ov nógv pláss, og so var eingin trupulleiki hjá skotum at senda bóltin framvið Gunnari Nielsen.

## Nógvar útskiftingar

Føroyska liðið var væl við fyrstu løtuna og legði bragdliga fyri. Umframt frísparksroyndina hjá Jann Inga Petersen, var nógv veiggj í framrættaða føroyska spælinum.

Men tá Skotland kom á odda, gekk bara ein veg. Danny Wilson legði heimaliðið á odda, Erling Jacobsen gjørdi sjálvmál, og Jamie Mackie skoraði til 3-0.

Skotland var við yvirlutan aftaná hvíldina, men dysturin var nógv merktur av nógvu útskiftingunum, sum venjararnir framdu í seinna hálvleiki.

Tórður Thomsen, Levi Hanssen, Christian Mouritsen, Pól Jóhannus Justinussen og Rógvi Poulsen vóru skiftir inn í seinna hálvleiki.

Føroyska liðið royndi at hóra undan sum frægast í seinna hálvleiki, og tað eydnaðist so mikið, at Skotland fekk ikki fleiri mál.

Craig Levein, skotski landsliðsvenjarin, er nøgdur við dystin og úrslitið móti føroyska landsliðnum í gjár.

Tað skrivar teamtalk.com.

– Úrslitið er umráðandi, tí vit vildu fremst av øllum vinna dystin. Eg eri serliga fegin um, at fleiri av yngru spælarunum stóðu seg væl, sigur Craig Levein.

Barry Bannan var helst mest eyðsýndur í gjár.

Darren Fletcher úr Manchester United, og liðformaður á skotska landsliðnum, var fegin um avrikið hjá Bannan.

*uni@sosialurin.fo*

**Skotland – Føroyar** 3-0 (3-0)

Dómari: Paul van Boekel

**1-0: Danny Wilson, 24.**
**2-0: Erling Jacobsen, sjálvmál, 30.**
**3-0: Jamie Mackie, 44.**

Føroyar: Gunnar Nielsen (Tórður Thomsen) – Jónas Tór Næs, Atli Gregersen, Jóhan Troest Davidsen, Erling Jacobsen – Bogi Løkin (Levi Hanssen), Daniel Udsen (Pól Jóhannus Justinussen), Jann Ingi Petersen (Christian Lamhauge Holst), Hjalgrím Elttør – Christian Lamhauge Holst (Rógvi Poulsen) – Jóan Símun Edmundsen